## Rushdie til Keypmannahavnar

Millum gestirnar á altjóða bókmentaráðstevnuni í Keypmannahavn í fjør var tann umstríddi bretsk-indiski rithøvundurin Salman Rushdie, og nú er fráboðað, at hann verður høvuðsnavnið á ársins bókmentaráðstevnu, sum verður í Keypmannahavn í døgunum frá 15. til 17. mai. Millum tey donsku nøvnini á ráðstevnuni verða rithøvundarnir Suzanne Brøgger, Pia Juul og Kirsten Hammann, skrivar Ritzau. Bókmentaráðstevnan í Keypmannahavn er ikki ein sølustevna, men ein ráðstevna, sum viðger fagrar bókmentir og teirra týdning.



## Skil á búskapin

Eitt er, hvat tann nýggi danski forsætisráðharrin sjálvur heldur vera tær týdningarmestu uppgávurnar at fera undir at loysa, men hann kann eisini spyrja veljararnar, tí teir hava eisini sína hugsan um tað. Í einari kanning hjá Gallup sæst, at 34 prosent halda búskaparkreppuna vera ta týdningarmestu uppgávuna, sum hann skal taka sær av. Harafturímóti nevna minni enn fimm prosent innflytarar, vælferð og kriminalitet sum tað týdningarmesta. Kanningin hjá Gallup vísir, at tað eru veljarar úr øllum flokkum, sum seta búskasparkreppuna ovast sum ta týdningarmestu uppgávuna.

# Rækjuflotin aftur farin at geva pengar

**Útlitini hjá føroyska rækjuflotanum, sum seinastu árini er tódnaður niður í trý skip, eru slett ikki so galin í løtuni. Nú er líkt til, at hesin floti, sum í fleiri ár hevur verið í sera tungum sjógvi, aftur er við at reisa seg. Gongst, sum higartil í ár, er ikki óhugsandi, at rækjuflotin samanlagt fer at geva eitt rakstrarligt avlop**




RÆKJUVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Árið í ár kann gerast árið, har føroyski rækjuflotin fyri fyrstu ferð í mong ár fer at hanga saman fíggjarliga.

Í 2007 hekk saman hjá rækjutrolaranum í Kollafirði, Arctic Viking, sum rakstrarliga hevði slakar 4 miljónir krónur í avlopi.

Árið 2007 kundi eisini verið árið, tá rækjutrolararnir í Leirvík, Havborg, fyrrverandi Sout Island og Fríborg, fyrrverandi Napoléon, hingu saman. Men leirvíkstrolararnir vóru serstakliga óhepnir hetta árið, og tí eydnaðist teimum ikki at fáa javnvág í raksturin hetta árið.

### Oljuprísir jarðløgdu

Í 2008 hevði rækjutrolarin í Kollafirði aftur hall, tó at batar vóru árið fyri. Høgu oljuprísirnir slerdu púrasta grundarlagið undan einum líkinda ári, og serliga var tað várið og summarið, har oljuprísirnir settu met.



*- Verður gongdin, soleiðis sum hon hevur verið higartil í ár, og eingir óvæntaðir trupulleikar stinga seg upp, er ikki óhugsandi, at rækjuflotin fer at hava avlop í rakstrinum í ár, sigur Jóhan Joensen, reiðari og formaður í Felagnum Rækjuskipum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Út á heystið lækkaðu prísirnir aftur, og í dag er bunkringarliturin kanska hálva triðju krónu bíligari, enn tá hann var hægstur fyri minni enn einum ári síðan.

Ein rækjutrolari sum Arctic Viking brúkar einar 9.000-10.000 litrar av olju um samdøgnið, og tí merkist tað skjótt, tá oljuprísirnir sveiggja so nógv.

Enn er roknskapurin hjá P/F Líðini, sum eigur Arctic Viking, ikki endaliga liðugur fyri 2008, og tí dugir reiðarin, Jóhan Joensen, ikki at siga ítøkiliga, hvussu árið í fjør vignaðist.

- Men tað er í hvussu er greitt, at árið 2008 aftur hevur givið hall, sigur hann.

### Batnandi útlit

Jóhan Joensen er eisini formaður í Felagnum Rækjuskipum, og hann heldur, at útlit eru til, at árið í ár fer at roynast hampiligt.

Hann heldur tað ikki vera óhugsandi, at føroyski rækjuflotin, sum í dag telir trý skip, samanlagt fer at hava eitt avlop.

- Eg fari sjálvandi ikki at úttala meg vegna skipini í Leirvík, men verður gongdin, soleiðis sum hon hevur verið higartil í ár, og eingir óvæntaðir trupulleikar stinga seg upp, er ikki óhugsandi, at rækjuflotin fer at hava avlop í rakstrinum.

Føroyska rækjukvotan í Eysturgrønlandi, sum ES hevur tillutað okkum, er upp á tilsamans 1335 tons. Tað eru tey trý skipini, sum eftir eru í flotanum, ið eiga hesa kvotu. Ein partur av rættindunum eru keypt frá feløgum, sum áður høvdu rækjuskip.

### Stóran týdning

- Kvotan í Eysturgrønlandi hevur verið 1150 tons í nógv ár, men við seinastu sínámillum samráðingar millum Føroyar og ES varð kvotan økt við tilsamans 185 tonsum.

Jóhan sigur, at rækjuveiðan í Eysturgrønlandi hevur vignast væl í ár, og eitt nú hevur Arctic Viking gjørt tveir túrar, sum tilsamans góvu 500 tons, meginparturin kókaðar rækur, sum í stóran mun eru seldar á evropeiska marknaðinum.

Leirvíkstrolararnir hava eisini verið til fiskiskap í Eysturgrønlandi.

Arctic Viking er liðugur við sína kvotu í Grønlandi og er nýliga byrjaður nýggjan túr á Flemmish Kap.

- Rækjukvotan í Eysturgrønlandi hevur stóran týdning fyri skip og manning, og vit fegnast um, at árið í ár hevur roynst væl í so máta, sigur reiðarin.

Við Artic Viking eru 19 mans, og skipari hendan túrin er Nicklái Petersen.

### Onnur rættindi

Føroyski rækjuflotin eigur eisini 1606 fiskidagar á Flemmish Kap og 922 fiskidagar uppi við Svalbard.

Fiskidagarnir við Svalbard verða partvís brúktir, og eitt nú var Arctic Viking ein túr á Svalbards-leiðini í fjør vár. Hesin túrurin royndist nøkulunda.

- Aftrat kvotuni í Eysturgrønlandi, fiskidøgunum á Flemmish Kap og við Svalbard, hava vit eisini loyvi at